VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

# Býráðið

**Dagfesting:** 22.06.2020 kl. 18:00
**Fundarstaður:** Bygdarhúsið í Miðvági
**Málnr.:** 20/00006

Til staðar: Eyðdis Hartmann Niclasen, Dagbjørn Hansen, Albert Ellefsen, Jens Gaardlykke, Heðin Poulsen, Dánjal Thomsen, Jonhard Joensen, Jórun S. Haraldsen, Jóhannis Joensen

Varalimir: Tórdis Dam Johannessen

Ikki til staðar: Rósa Samuelsen, Dánial Johansen

Aðrir partar:

Fundarskrivari: Jóannes N. Dalsgaard


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | | |
| 67/20 | 19/00837-4 | Støðutakan til fyrispurning frá Petur Elias Petersen um at gera makaskifti millum matr. nr. 237c og 236b í Sandavági | 3 |
| 68/20 | 19/00855-10 | Umsókn um byggiloyvi til goymsluhøll á matr. nr. 231m í Miðvági | 6 |
| 69/20 | 20/00206-7 | Støðutakan til uppskot frá Rósu Samuelsen býráðslimi um at broyta reglugerð fyri kirkjugarðar | 7 |
| 70/20 | 20/00409-7 | Umvæling av Gamla Skúla í Sandavági | 10 |
| 71/20 | 20/00458-7 | Støðutakan til umsókn frá Hervør Jørgensen um loyvi at keypa burturav matr. nr. 13a í Miðvági | 11 |
| 72/20 | 20/00459-3 | Støðutakan til uppskot frá Ólavi Guttesen um, at kommunan átekur sær alla byggibúning av útstykkingini við Stóraklett. | 12 |

VÁGA KOMMUNA

| | | | |
|---|---|---|---|
| 73/20 | 20/00460-4 | Støðutakan til umsókn um stuðul til app í samband við fyrstu hjálp | 13 |
| 74/20 | 20/00506-4 | Uppskot frá Jonhard Joensen býráðslimi um at broyta byggisamtyktina fyri eitt økið úti á Bakka í Sandavági. | 14 |
| 75/20 | 20/00550-2 | Umsókn um loyvi at byggja altan á matr. nr. 111c í Miðvági | 15 |
| 76/20 | 20/00551-2 | Umsókn um byggiloyvi til hjall á matyr. nr. 111c í Miðvági | 16 |
| 77/20 | 20/00555-2 | Støðutakan til uppskot frá Jens Gaardlykke um at broyta part av D-økinum (havnaøki) á Prestlandinum til G-øki (neyst og bátapláss | 17 |
| 78/20 | 20/00558-2 | Støðutakan til áheitan frá Jonhard Joensen um at játta pening til at gera neyðugar ábøtur á húsini í Haraldsstovu | 18 |
| 79/20 | 20/00567-2 | Støðutakan til umsókn frá Miðvágs Róðrarfelag um loyvi at gera bátadrátt við róðrarneystið á matr. nr. 233e | 19 |
| 80/20 | 20/00572-2 | Laðing av skráa fram við Sandinum í | 20 |
| 81/20 | 20/00580-1 | Eigarin av matr. nr. 133k í Sandavági bjóðar kommununi at keypa part av matriklinum. | 21 |
| 82/20 | 20/00587-1 | Støðutakan til uppskot frá bygginevndini at deila 2. byggistig upp í tvey byggistig, og at farast skal undir projektering av 2. byggistigi | 23 |
| 83/20 | 20/00599-2 | Støðutakan til uppskot frá Heðini Poulsen býráðslimi um at at seta prísin á grundstykkjum í Vatnsoyrum til kr. 115,-/m2 | 24 |
| | | | |

Formansváttan:____________

**Til støðutakan**

## 67/20 Støðutakan til fyrispurning frá Petur Elias Petersen um at gera makaskifti millum matr. nr. 237c og 236b í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.01.2020 | 3/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.01.2020 | 4/20 |
| 3 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 05.02.2020 | 5/20 |
| 4 Býráðið | 24.02.2020 | 12/20 |
| 5 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 26.05.2020 | 33/20 |
| 6 Býráðið | 22.06.2020 | 67/20 |

**Málslýsing:**

Kommunan hevur heitt á Petur Elias Petersen um at selja kommununi partin av matr. nr. 237c í Sandavági, har kommunan hevur latið gjørt gøtu og oman til Stórá. Talan er um umleið 72 fermetrar.



Lendið, kommunan hevur heitt á Petur Elias um at selja

Petur Elias hevur vent aftur við fyrispurningi, um kommunan vil gera gerðabýti soleiðis, at hann fær tann lutin frá kommununi, sum er norðanfyri garðin (Løgmannsgarðin) á matr. nr. 236b frá gøtuni og niðan ímóti vegnum á Steigartúni. Um tann ognin er størri, er hann sinnaður at rindað gjald fyri munin.

Formansváttan:____________




Lendið, Petur Elias ynskir at ogna sær

Sambært uppmáting á Kortal.fo er lendið, Petur Elias ynskir at ogna sær frá kommununi, umleið 112 fermetrar.

Í býarplaninum liggur matr. nr. 237c í B-øki (sethús) og H-øki (frílendi).
Matr. nr. 236b liggur í M-øki (fornminni).
Umhvørvisstovan krevur vanliga, at øki er avlagt til sama endamál, um marknaumskipan skal fremjast. Er talan um smáar broytingar, hava tey onkuntíð gingið við til, at býarplanurin er tillagaður aftaná broyting.




Formansváttan:____________

Viðmerkingar frá umsitingini: Talan er um øki við Løgmansgarðin. Um býráðið ynskir at lata lendið, metir umsitingin tað vera rætt, fyrst at hoyra Tjóðsavnið.

**<u>Tekniska nevnd 10. januar 2020:</u>**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**<u>Fíggjarnevndin 16. januar 2020:</u>**
**Avgerð:**

Avgjørt at beina málið í mentanar- og trivnaðarnevndina.

**<u>Mentunar- og trivnaðarnevndin 05. februar 2020:</u>**
**Avgerð:**

Mælt til at viðmæla makaskifti, treytað av góðkenning frá Tjóðsavninum og øðrum viðkomandi myndugleikum.

**<u>Mentunar- og trivnaðarnevndin 26. maj 2020:</u>**
**Avgerð:**

Mælt verður frá at gera makaskifti, samb. tilráðing frá Tjóðsavninum.

**<u>Býráðið 22. juni 2020:</u>**
**Avgerð:**

Samtykt ikki at ganga umbøn um makaskifti á møti.

Formansváttan:____________

## 68/20 Umsókn um byggiloyvi til goymsluhøll á matr. nr. 231m í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.06.2020 | 55/20 |
| 2 Býráðið | 22.06.2020 | 68/20 |

**Málslýsing:**

Sandavágs timburhandil søkir um byggiloyvi til goymsluhøll á leiga øki á matr. nr. 231m í Miðvági.

Ætlanin er at byggja høllina, sum eina stálkonstruktión klædda við dúki.

HMP hevur byggimálsviðgjørt umsóknina, og siga teir at frástøðan millum nýggja og verandi høll skal verða 7,5 metrar um brunakrøvini skulu verða hildin.

Tó meta teir at tað er ikki eitt stórt frávik at geva, um frástøðan verður 5 metrar. Hetta er tí at nýggja høllin skal verða goymsla til stál, og er hetta ikki at rokna, sum serliga eldfimt.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Um byggiloyvi verður givið skal umsitingin gera vart við, at neyðugt verður at geva loyvi til at byggja umleið 5 metrar vestur um markið á matriklinum.

Hetta kemur at gera vegin vestan fyri høllina, nakað smælri enn hann er í dag.

Nú er vegurin umleið 15 metur breiður, og um byggiloyvi verður játtað verður hann umleið 10 metur breiður.

**Tekniska nevnd 12. juni 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt at geva loyvi at byggja 5 m eystur um matrikulin, við 5 m frástøðu til verandi høll.

**Býráðið 22. juni 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at geva loyvi samsvarandi viðmæli frá teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 69/20 Støðutakan til uppskot frá Rósu Samuelsen býráðslimi um at broyta reglugerð fyri kirkjugarðar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 29.04.2020 | 24/20 |
| 2 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 22.06.2020 | 41/20 |
| 3 Býráðið | 22.06.2020 | 69/20 |

**Málslýsing:**

Rósa Samuelsen býráðslimur skjýtur uppa at broyta *Reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Vága kommunu* soleiðis:

1. Í grein 4 verður soljóðandi reglubrot sett inn sum nýtt 4. reglubrot:

   *"Verða gravsteinar og gomul leiði flutt, skal tað skrásetast í kirkjugarðsbókina og á kirkjugarðskortinum. Gamla nummari skal viðmerkjast á nýggju grøvini, um leivdir ikki eru fluttar."*

   Grein 4 verður eftir hetta soljóðandi:

   *"**Kirkjugarðsbókin og kirkjugarðskortið***

   *Býráðsskrivstovan førir endaligu kirkjugarðsbøkurnar og kirkjugarðskortini.*

   *Kirkjugarðsbøkurnar verða førdar í tveimum eintøkum og samsvarandi kirkjugarðstekningunum. Gravarin førir avrit av kirkjugarðsbókini og kirkjugarðskortunum.*

   *Í kirkjugarðbókina verða skrivað: Nummar á grøv, nøvn teirra deyðu, føðistaður, føðingardagur og ár, deyðadagur og ár, seinasti bústaður teirra og jarðarferðardagur.*

   *Verða gravsteinar og gomul leiði flutt, skal tað skrásetast í kirkjugarðsbókina og á kirkjugarðskortinum. Gamla nummari skal viðmerkjast á nýggju grøvini, um leivdir ikki eru fluttar.*

   *Í minsta lagi eina ferð um árið verða bøkurnar samanbornar, og váttað skal verða, at møgulig mistøk eru rættað.*

   *Gravarin skal síggja til, at allir upplýsingar í bókini og kortunum samsvara við gravirnar og upplýsingarnar hjá kommununi.*

   *Vága kommuna eigur kirkjugarðsbøkurnar og kortini fyri kirkjugarðarnar."*

2. Í grein 6 verður soljóðandi reglubrot sett inn sum nýtt 1. reglubrot:

*"Leiðið er friða í 50 ár. Eftir hetta, kann kommunan yvirtaka leiðið og kann, um neyðugt, tøma gomlu grøvina (leiðið), og brúka leiðið til nýtt gravstað. Stendur gravsteinur uppi, hevur kommunan loyvi at flyta steinin."*

Grein 6 verður eftir hetta soljóðandi:

***"Friðing***

*Leiðið er friða í 50 ár. Eftir hetta, kann kommunan yvirtaka leiðið og kann, um neyðugt, tøma gomlu grøvina (leiðið), og brúka leiðið til nýtt gravstað. Stendur gravsteinur uppi, hevur kommunan loyvi at flyta steinin.*

*Um ætlanir eru at friða kirkjugarðin, skal málið verða lagt fyri býráðið eftir tilmæli frá avvarðandi nevnd."*

3. Grein 8 verður orðað av nýggjum, og verður soljóðandi:

***"Um gravir***

*Loyvt er at grava yvir gamlar gravir (gomul leiði) sum eru 50 ár ella eldri. Avvarðandi hava frammíhjárætt, at grava yvir grivnar gravir um talan er um gravir (leiði) sum eru yngri enn 70 ár."*

**<u>Mentunar- og trivnaðarnevndin 29. april 2020:</u>**
**Avgerð:**

Pkt. 1: Nevndin mælir til at samtykkja broytingina.

Pkt. 2: Nevndin mælir til at samtykkja broytingina, tó so at «50 ár» verður broytt til «70 ár».

Pkt. 3: Nevndin mælir til at samtykkja broytingina, tó so at «50 ár» verður broytt til «70 ár» og at seinna punktum verður strikað.

Nevndin mælir til, at umsitingin, áðrenn málið verður lagt fyri býráðið, upplýsir, hvussu nógvar gravir í kirkjugørðunum í kommununi, eru eldri enn 70 ár.

---

**<u>Viðmerkingar frá umsitingini 17.06.2020</u>**

Í Miðvági eru 73 gravir og í Sandavági eru 112 gravir, sum eru eldri enn 70 ár.

**<u>Mentunar- og trivnaðarnevndin 22. juni 2020:</u>**
**Avgerð:**

Pkt. 1: Nevndin mælir til at samtykkja broytingina.

Pkt. 2: Nevndin mælir til at samtykkja broytingina, tó so at «50 ár» verður broytt til «70 ár».

Pkt. 3: Nevndin mælir til at samtykkja broytingina, tó so at «50 ár» verður broytt til «70 ár» og at seinna punktum verður strikað.

Mælt verður til at áseta í grein 9, stk. 1 í reglugerðini, at ein vaksnamannagrøv skal verða í minsta lagi 2,5 m djúp.

**<u>Býráðið 22. juni 2020:</u>**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við avgerðini hjá mentunar- og trivnaðarnevndini frá 22.06.2020.

Broytta reglugerðin fær gildið, tá hon er góðkend av Føroya Stiftsstjórn.

VÁGA KOMMUNA

## 70/20 Umvæling av Gamla Skúla í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.06.2020 | 57/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2020 | 54/20 |
| 3 Býráðið | 22.06.2020 | 70/20 |

**Málslýsing:**

Arbeiðið at umvæla Gamla Skúla uttan var boðið út millum lokalar timburmeistarar.

Inn komu tvey boð og vóru tey uppá:

| | |
|---|---|
| Sp/f Trøðhamar | **Kr. 1.234.812,34** |
| Sp/f JPH Sp/f E.P. Smíð Sp/f Hølck Smíð | **Kr. 910.941,45** |

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Avsettar til at umvæla skúlan bæði uttan og innan vóru í fíggjarlógini
**Kr. 500.000,00**

**Tekniska nevnd 12. juni 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt at takað av lægra tilboðnum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt at taka undir við teknisku nevnd

**Býráðið 22. juni 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka av lægra tilboðnum.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

# 71/20 Støðutakan til umsókn frá Hervør Jørgensen um loyvi at keypa burturav matr. nr. 13a í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.06.2020 | 58/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2020 | 55/20 |
| 3 Býráðið | 22.06.2020 | 71/20 |

**Málslýsing:**

Hervør Jørgensen eigari av matr. nr. 12e í Miðvági søkir um at sleppa at keypa ca. 380 m2 av matr. nr. 13a í Miðvági frá Vága kommunu.

**Viðmerking frá umsitingini:**

Í sambandi við, at kommunan keypti matr. nr. 13a, hevur ráðgevingarfyritøkan HMP gjørt uppskot um útstykkingarætlan í økinum. Henda útstykkingarætlan umfatar eisini økið, Hervør ynskir at keypa.

Miðvágs bygdaráð hevur í 1991 givið loyvi til, at grannastykkið verður víðkað niðaneftir við eini ál, meðan bygdaráðið í 1994 mælti frá at stykkið var víðkað niðaneftir, tí ynski var um, at ovaru mørkini á grundstykkjunum í økinum vóru jøvn, so til ber í framtíðini at gera eina útstykkking har.

**Tekniska nevnd 12. juni 2020:**
**Avgerð:**

Frámælt.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt at taka undir við teknisku nevnd

**Býráðið 22. juni 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt, ikki at ganga umsókniní á møti.

Formansváttan:____________

## 72/20 Støðutakan til uppskot frá Ólavi Guttesen um, at kommunan átekur sær alla byggibúning av útstykkingini við Stóraklett.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.06.2020 | 59/20 |
| 2 Býráðið | 22.06.2020 | 72/20 |

**Málslýsing:**

Ólavur Guttesen skjýtur upp, at Vága kommuna spyr eigarararnar av grundstykkjunum við Stóraklett í Sandavági, sum enn ikki eru grivin út, um teir eru áhugaðir í, at kommunan ger grundstykkini byggiklár fyri kostprís.

**Tekniska nevnd 12. juni 2020:**
**Avgerð:**

Frámælt

**Býráðið 22. juni 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka málið av skrá.

Formansváttan:____________

# 73/20 Støðutakan til umsókn um stuðul til app í samband við fyrstu hjálp

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 26.05.2020 | 34/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2020 | 51/20 |
| 3 Býráðið | 22.06.2020 | 73/20 |

**Málslýsing:**

Í skrivi til Vága kommunu dagfest 07.05.2020 søkja Ragnar Jacobsen v.fl. um stuðul til rakstur av appini 'Renn Fyri Lívi'.

Árligi raksturin er mettur til kr. 40.000.

Søkt verður um stuðul, svarandi til kr. 40.000/talinum av kommunum, sum játtað stuðul.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 26. maj 2020:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at veita stuðul.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2020:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at taka undir við mentunar- og trivnaðarnevndini.

**Býráðið 22. juni 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at stuðla.

Formansváttan:_____________

VÁGA KOMMUNA

# 74/20 Uppskot frá Jonhard Joensen býráðslimi um at broyta byggisamtyktina fyri eitt økið úti á Bakka í Sandavági.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.06.2020 | 60/20 |
| 2 Býráðið | 22.06.2020 | 74/20 |

**Málslýsing:**

Jonhard Joensen býráðslimur skjýtur upp at broyta byggisamtyktina fyri eitt økið úti á Bakka í Sandavági soleiðis, at partur av matr. nr. 323a, sum liggur beint norðanfyri matr. nr. 321 verður broytt frá 'Økið D: Havnarøki' til 'Økið C: Vinnuendamál




Núverandi byggisamtykt.




Uppskot til broyting.
Reyða økið er tað, ið uppskotið fevnir um.

**Tekniska nevnd 12. juni 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Býráðið 22. juni 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við uppskotinum.

Formansváttan:_____________

## 75/20 Umsókn um loyvi at byggja altan á matr. nr. 111c í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.06.2020 | 62/20 |
| 2 Býráðið | 22.06.2020 | 75/20 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr. nr. 111c í Miðvági søkir um loyvi at byggja altan sambært viðheftu tekning.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Matrikulin liggur í øki F-Almenn frítíðarøki.

Tá umsøkjarin fyrr hevur søkt um byggiloyvi er umsóknin send til friðingarnevndina til ummælis. Hetta er orsakað av at bygt verður so nær eini á.

**Tekniska nevnd 12. juni 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt treytað av at friðingarmyndugleikarnir geva loyvi.

**Býráðið 22. juni 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at ganga umsóknini á møti, treytað av at friðingarmyndugleikin gevur loyvi.

# 76/20 Umsókn um byggiloyvi til hjall á matr. nr. 111c í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.06.2020 | 63/20 |
| 2 Býráðið | 22.06.2020 | 76/20 |

## Málslýsing:

Eigarin av matr. nr. 111c í Miðvági søkir um loyvi at byggja hjall sambært viðheftu tekning.

## Viðmerkingar frá umsitingini:

Matrikulin liggur í øki F-Almenn frítíðarøki.

Tá umsøkjarin fyrr hevur søkt um byggiloyvi er umsóknin send til friðingarnevndina til ummælis. Hetta er orsakað av at bygt verður so nær eini á.

## Tekniska nevnd 12. juni 2020:
**Avgerð:**

Viðmælt.

## Býráðið 22. juni 2020:
**Avgerð:**

Samtykt at ganga umsóknini á møti.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 77/20 Støðutakan til uppskot frá Jens Gaardlykke um at broyta part av D-økinum (havnaøki) á Prestlandinum til G-øki (neyst og bátapláss

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.06.2020 | 64/20 |
| 2 Býráðið | 22.06.2020 | 77/20 |

**Málslýsing:**

Jens Gaardlykke mælir til at broyta part av D-økinum (havnaøki) á Prestlandinum í Miðvági til G-øki (neyst og bátapláss).

**Tekniska nevnd 12. juni 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt

**Býráðið 22. juni 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at beina málið í vinnu- og havnanevndina.

Formansváttan:____________

# 78/20 Støðutakan til áheitan frá Jonhard Joensen um at játta pening til at gera neyðugar ábøtur á húsini í Haraldsstovu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.06.2020 | 65/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2020 | 56/20 |
| 3 Býráðið | 22.06.2020 | 78/20 |

**Málslýsing:**

Jonhard Joensen heitir á býráðið um at játta pening til at gera neyðugar ábøtur á húsini í Haraldsstovu.

**Tekniska nevnd 12. juni 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2020:**
**Avgerð:**

Meirilutin mælir til at seta húsið í nýtiligan stand so húsið kann brúkast.

Borgarstjórin mælir til at málið verður beint aftur í umsitingina at arbeiða víðari við hvørjar framtíðarætlanir eru fyri húsið.

**Býráðið 22. juni 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at játtað kr. 200.000 til ábøtur á Haraldsstovuhúsini í Sandavági soleiðis at húsini kunnun latast upp í seinasta lagi 01.09.2020.

Formansváttan:____________

# 79/20 Støðutakan til umsókn frá Miðvágs Róðrarfelag um loyvi at gera bátadrátt við róðrarneystið á matr. nr. 233e

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.06.2020 | 66/20 |
| 2 Býráðið | 22.06.2020 | 79/20 |

**Málslýsing:**

Miðvágs Róðrarfelag søkir um loyvi at gera drátt heimanfyri nýggju brúnna niðanfyri Róðrarneystið á matr. nr. 233e í Miðvági

**Tekniska nevnd 12. juni 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Býráðið 22. juni 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at geva loyvi.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 80/20 Laðing av skráa fram við Sandinum í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.06.2020 | 69/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2020 | 58/20 |
| 3 Býráðið | 22.06.2020 | 80/20 |

**Málslýsing:**

Tekniski leiðarin hevur, eftir boðum frá borgarstjóranum biði um tilboð frá J&K Petersen uppá at laða skráan fram við Sandinum í Miðvági.

Orsøkin til at biði er um tilboð uppá hetta er at gøtan, ið gongur fram við Sandinum er so lág, at tá høg flóð og nógvur vindur er um veturin liggur gøtan undir, og vandi er fyri at um tað ikki verður gjørt nakað fyri at byrgja fyri, so er gøtan burtur aftan á næsta vetur.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Undir gøtuni liggur pumpuleiðingin, ið førir alt spillvatn frá norðarar parti av Miðvági út í pumpubrunnin úti á Kumlum. Um gøtan skolar burtur liggur pumpuleiðingin sjónlig, og er stórur vandi fyri at hon fær skaða.

**Tekniska nevnd 12. juni 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt at arbeiða víðari við málinum. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt

**Býráðið 22. juni 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka av tilboðnum frá J&K Petersen og fíggja arbeiðið við eykaætlan.

Formansváttan:____________

## 81/20 Eigarin av matr. nr. 133k í Sandavági bjóðar kommununi at keypa part av matriklinum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.06.2020 | 72/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2020 | 60/20 |
| 3 Býráðið | 22.06.2020 | 81/20 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr. nr. 133k í Sandavági bjóðar kommununi at keypa áleið 13.540 $m^2$ av matriklinum fyri kr. 89,- fyri fermeturin.

Treytirnar eru hesar:

- At hann fær loyvi at keypa matr. nr. 4u undir Stórakletti.
- At kommunan átekur sær at stoypa múr fram við nýggja vegnum móti matriklinum, sum kommunan ikki keypir.
- At kommunan átekur sær at gera ein volla út móti landsvegnum.
- Eisini hevur seljarin eitt ynski um at fáa loyva at keypa matr. nr. 4t, sum liggur niðanfyri matr. nr. 4u, um Bústaðir ikki skal brúka tað.

**Viðmerkingar frá umsitingini.**

At stoypa múr fram við matriklum, sum liggja upp móti vegi, er heilt vanligt fyri kommununa at gera, tá vegir verða gjørdir.

Ætlanin hevur alla tíðina verði at gera ein volla út móti landsvegnum, frammanfyri eina møguliga nýggja útstykking.

**Tekniska nevnd 12. juni 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt at keypa, tó verður frámælt at selja matr. nr. 4t til seljaran.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd og at fíggja keypi við eykajáttan.

Formansváttan:_____________

**<u>Býráðið 22. juni 2020:</u>**
**Avgerð:**

Samtykt at taka av tilboðnum um at keypa matr. nr. 133k í Sandavági fyri kr. 89,- fyri fermeturin, við treytunum, sum seljarin setir, tó so, at kommunan ikki selir matr. nr. 4t. Keypið skal fíggjast við eykaætlan.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 82/20 Støðutakan til uppskot frá bygginevndini at deila 2. byggistig upp í tvey byggistig, og at farast skal undir projektering av 2. byggistigi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.06.2020 | 53/20 |
| 2 Býráðið | 22.06.2020 | 82/20 |

**Málslýsing:**

Bygginevndin mælir til at 2. byggistig verður deilt upp í tvey byggistig.

Nevndin heldur ikki tað er fíggjarligt rásarúm í løtuni at byggja 2. byggistig í einum, har byggikostnaðurin við øllum kann koma uppá 70 mill. kr. Nýggj kostnaðarmeting fyri 2. byggistig er 39,2 mill. kr. og er hendan upphæddin innanfyri fíggjarliga rásarúmið hjá kommununi.

Hetta viðførir at felagsøkið, kullan, smíðstova, jarnsmíðstova og 3 skúlastovur ikki vera gjørdar. Tekningar eru annars óbroyttar. Allar innleggingar vera gjørdar til eitt 3. byggistig, eisini.

Bygginevndin mælir eisini til *ikki* at projekterað 3. byggistig. Orsøkin er, at um 3. byggistig ikki verður bygt beinanveg kann hugsast at tekningar vera broyttar munandi, víst verður til bygging av 1. byggistigi, tá var 2. byggistig eisini projektera, eftirfylgjandi eru tekningar broyttar mundandi.

Vera fíggjarligu vánirnar betur í byggitíðini, mælir bygginevndin til at projekterað 3. byggistig eisini.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt

**Býráðið 22. juni 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt.

Formansváttan:____________

## 83/20 Støðutakan til uppskot frá Heðini Poulsen býráðslimi um at at seta prísin á grundstykkjum í Vatnsoyrum til kr. 115,-/m2

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 22.06.2020 | 83/20 |

**Málslýsing:**

Heðin Poulsen býráðslimur hevur skotið upp, at seta prísin á tøkum grundstykkjum í Vatnsoyrum til kr. 115,- fyri fermeturin.

**Býráðið 22. juni 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at seta prísin til kr. 100,- fyri fermeturin.

Samtykt at endurrindað teimum, sum hava keypt stykkið fyri hægri prís, munin.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl.

__________________________

Eyðdis Hartmann Niclasen

Dagbjørn Hansen

Albert Ellefsen

Jens Gaardlykke

Heðin Poulsen

Dánjal Thomsen

Jonhard Joensen

Jórun S. Haraldsen

Jóhannis Joensen

Tórdis Dam Johannesen

Formansváttan:_____________